

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 02 - 2012

# Supply Service sáttmála við Statoil

Supply Service hevur skrivað undir sáttmála við norska oljurisan Statoil, um leigu av veitingarskipinum Sjoborg, sum er undir bygging í Norra. Sjoborg verður latin reiðarínum 23. mars 2012, og fer síðani beinleiðis til Bergen, har sáttmálaskeiðið við Statoil byrjar. Sáttmálaskeiðið er 6 mánaðar við møguleika fyri at leingja í 1 ár. Umframt veiting, fevnir sáttmálin eisini um oljurudding og rescue. Supply Service fer at manna skipið við føroyingum burturav. Sjoborg er av slagnum Havyard 833. Tað er eitt PSV design frá Havyard Design, sum er ment í tøttum samstarvi við Supply Service, við fokus á rakstrarbúskap, stóran fleksiblan kapasitet til at flyta fleiri ymisk sløg av farmi, góðar hentleikar til manningina og at minka um árin á umhvørvið (Clean Design, optimeraðum skrokklinjum, diesel- elektrisk framdrift, katalysatorum osv.). Havyard 833 er ein stórur PSV, væl útgjørdur til at bjóða seg fram til flestu sløg av tænastum og veitingum til frálandavinnuna. Umframt stóran fleksiblan lastkapasitet, verður skipið útgjørt til oljuverndartilbúgving (NOFO 2009) og stand-by / rescue. Skipið hevur fylgjandi høvuðsdáta - Longd - 86 m Breidd - 19,6 m Deyðvekt - 4700 tons Dekkvídd - 1002 m2 Ferð - 15 sjómíl Í Supply Service fegnast vit um sáttmálan við Statoil, sum er tann størsti operatørurin á norskum øki. Sáttmálin staðfestir eisini tað góða arbeiðið, sum manningin á hinum veitingarskipunum hjá reiðarínum, Eldborg og Saeborg, hava avrikað, sigur Jens Meinhard Rasmussen í eini viðmerking.